


**Nr. 13** **25. juni 2017** **77. árg.**

# Tak og leið meg nú

*...og at kenna kærleika Krists, sum ber av øllum kunnleika...*
*Efes. 3,19.*

*Tak og leið meg nú!*
*Tak mítt syndatyngda hjarta –*
*Tak og leið meg nú!*

Tað hendi einaferð, at ein professari í teologi gjørdi ein støðg í fyrilestri sínum og las hesar reglurnar, sum standa her omanfyri.

Millum studentarnar var ein, sum henda barnsliga og einfalda trúgvin hjá professaranum hevði stóra ávirkan á. Hann gloymdi tær djúphugsaðu útleggingarnar, men tær einføldu reglurnar bitu seg fastar. Mangan er tað allarstørsta sera einfalt. Soleiðis hevur Gud í kærleika sínum lagt tað til rættis, fyri at tey klóku ikki skulu hava nakran fyrimun í at læra trúarinnar veg at kenna.

Hvat snýr tað seg um? Tað ræður um at verða rótfestur í Kristi kærleika. At synda er at venda Gudi bakið. – At vera líkasælur viðvíkjandi Gudi og at ganga sínar egnu leiðir. Tað fingu vit at vita í líknilsinum um burturfarna sonin. Beint framman fyri tað standa líknilsið um burturmista seyðin og burturmista peningin. Felags fyri øll hesi trý líknilsini er, at tey eru um okkurt, sum er farið burtur haðani, sum tað hoyrdi heima. At synda er at vera komin burtur frá tí Gudi, sum vit hoyra heima hjá.

At trúgva er at vera heima hjá Gudi, at vera grógvin fastur í kærleika hansara, at vera bundin at vilja hansara og at ganga vegir hansara.

*Tak og leið meg nú!*
*Tak mítt syndatyngda hjarta –*
*Tak og leið meg nú!*

Kanska sigur tú, at hasum hevur tú ikki tørv á. So mást tú endurskoða tínar metingar, tí at grund-sannføringin hjá einum vanligum menniskja er sannføringin um ***skuld,*** og høvuðs-orðið í gleðiboðskapinum er ***fyrigeving.***

# Leif á Flekkerøya vitnar

Rita Aasen hevði eina samrøðu við Leif á Flekkerøya í sendingini „Pottemakerens hus". Har bar hesin gamli maðurin fram sín sterka vitnisburð:

Eg havi verið á sjónum alt mítt lív. Tá ið kona mín hevði føtt yngra barnið hjá okkum, gjørdist hon ógvuliga sjúk. Hon fekk liðagikt av ringasta slag. Tað var ikki so heppið, tí eg var so nógv burturstaddur. Konan fekk 33 skurðviðgerðir. Hon fekk skift tey ymsu liðini út; men ikki vardi leingi, so var hon líka sjúk aftur. Hon fekk sterkan heilivág móti pínu. Tað byrjaði við kortison og endaði við „cellugift", tey kalla. Hon var kropnað saman og var svørt heilt niðan undir bringuna. At enda doyði hon.

Eg var ógvuliga ringur um alt hetta og gjørdist sjálvur sjúkur, beint eftir at hon doyði. Tað var ein blóðæðr í maganum, sum brast. Men eg kom livandi frá tí. Fýra mánaðir eftir at hon var deyð, sat eg ein morgunin við køksborðið. Tá hendi nakað heilt ótrúligt. Brádliga situr kona mín á einum øðrum stóli við køksborðið. Eg sá kjólan, sum hon var í. Hon rætti báðar hendurnar út og vísti mær tær. Fingrarnir vóru heilt útrættir og vakrir. Nú var hon ikki krypil longur.

*„Eg havi tað so ómetaliga gott,"* segði hon.

*„Eg komi við tær,"* segði eg og reistist.

*„Nei, ikki nú. Tú skalt ikki doyggja enn,"* segði hon.

Eg hugdi upp á hana, og alt í einum kom tann ræðandi tankin til mín: *„Ja, men hvar fert tú, um tú doyrt nú?"*

Tað var, sum dugdi hon at lesa tankarnar hjá mær, tí hon segði: *„Leif, fyri 2000 árum síðani hekk Jesus á krossinum og betalti fyri allar tínar syndir. Hann bar fram eitt fullkomið offur. Tú ert fríur bara við trúgv á Hann.“*

So broyttist hon fyri eygunum á mær. Kjólin, sum eg hevði sæð, gjørdist hvítur, og hon bleiv hvít øll, sum hon var, og hvarv upp móti himli.

Eftir sat eg. Men eg hevði fingið mikla troyst, og síðani tann dag havi eg livað í trúnni á mín kæra Frelsara, og eg gleði meg til tann dag, Hann skal taka meg heim,“ endaði hesin aldrandi maðurin, meðan tárini runnu stríð oman eftir kjálkum hansara.

*Effie Campbell.*

# Hin góðviljaði kærleikin

*Kærleikin er góðviljaður. 1.Kor. 13,4.*

At kærleikin er góðviljaður merkir, at hann altíð er til reiðar at gera okkurt fyri onnur, ja, enntá at geva øðrum alt. Jesus er hitt stóra fyridømið. Mong vilja bara gera øðrum eina tænastu, um tey sjálv fáa fyrimun av tí. Men hetta er ikki góðviljaður kærleiki – hin góðviljaði kærleikin væntar sær ikki so frægt sum tøkk afturfyri.

Enntá móti mótstøðumanninum skulu vit vera góðviljað, hevur Jesus sagt: „Ver skjótur til sættis við mótstøðumann tín.“ (Matt. 5,25) Hetta er uppaftur torførari, men fyri Gudi eru allir lutir gjørligir – eisini at geva okkum hitt góðviljaða sinnalagið.

Latum okkum hugsa um hetta orðið, tá ið vit tala og hugsa um tey, ið hava øðrvísi trúgv enn vit! Vit kunnu ikki altíð arbeiða saman, men vit kunnu vera góðviljað hvør við annan.

*t.* týddi.

---

Ein trúgvandi maður í Noregi varð spurdur, hvørjum hann gav sína atkvøðu, nú tá ið tað bæði var vanligt val og kirkjuráðsval. „Eg velji tað, sum vigar tyngst heima hjá Gudi,“ svaraði hann. Og tað var klókt svarað, tí: „Teir, ið á Harran líta, eru sum Zions fjall, ið ikki vikast um ævir“ Sálm. 125,1.

*e.c.* ums.

# Tryggur hjá pápa

Ein hørð melduródn við toruslátti kom inn yvir Texas. Ein drongur, sum æt Paul og var eini 3-4 ára gamal, minnist, hvussu bangin børnini gjørdust, tá ið pápin rópti tey inn og bað tey og mammuna leggja seg saman í ein trunka mitt á gólvinum og breiddi eina madrassu út yvir tey. Pápin segði, at har vóru tey trygg.

Paul varnaðist, at pápin ikki lá saman við teimum, men stóð yviri við vindeygað og sá, at melduródnin skifti kós. Tá ið hann sá pápan standa har yviri við vindeygað, kreyp hann út undan madrassuni og tók við báðum ørmum um annað beinið á pápanum. Seinni fortaldi Paul: „Okkurt segði mær, at tá ið ódnir herjaðu, var tryggasta staðið undir liðini á pápa.“

Ver tú eisini trygg(ur) í dag – tætt undir liðini á Pápa tínum í himlinum. Tí Guds orð sigur: ***„Sum ein faðir er mildur móti børnum sínum, so er Harrin mildur mót teim, sum hann óttast.***“

*Sálm.103,13.*

# Ikki vónbrotin

Heimskendi listamálarin frá renæssansu-tíðini, Michelangelo, var komin væl upp í árini, tá ið ein gamal vinur ein dagin støkk inn á gólvið hjá honum. Vinurin sigur við hann: „Eftir eitt so gott lív má tað vera hart at síggja deyðan í eyguni?“

„Als ikki,“svaraði Michelangelo, „tá ið nú lívið hevur verið ein slík gleði, og deyðin kemur úr somu stóru og góðu kelduni, kunnu vit ikki gerast vónbrotnir av honum.“

Tann, sum hevur funnið festi og tryggleika í trúnni á Gud, kann bjóða deyðanum vælkomnum. Í tí æviga verða allir lívsins tostar stillaðir. Sum Skriftin sjálv sigur: ***„Og andin og brúðurin siga: „Kom!“ Og tann, sum hoyrir, sigi: „Kom!“ Og tann, sum tystur er, hann komi! Hvør, sum vil, hann taki lívsins vatn fyri onki!***“ Opb. 22,17.

---

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




*Nr. 14* *9. juli 2017* *77. árg.*

# Frelst av náði

*Tí av náði eru tit frelstir við trúgv* Efes. 2,8.

Av náði og við trúgv; báðir partar mugu vera við. Náðin er lendið, sum træið er gróðursett í, og trúgvin livir av náðinnar kraft. Náði merkir óuppiborin kærleiki. Onki vet av okkara egna er í henni. Náðin er ein gáva, sum rætt verður teimum mest óverdugu, og í henni er alt, sum neyðugt er til lív og frelsu. Náðin kemur til okkara í honum, sum tók á seg tænaramynd. Í honum er øll náðin útoyst, og til hansara má hvørt einstakt menniskja taka støðu.

„Tí av náði eru tit frelst við trúgv." Paulus vágar sær at siga, at frelsan er ein fullkomin veruleiki. Aðrastaðni verður frelsan umrødd sum nakað, sum vit eru ávegis ímóti. Her verður sagt: „Av náði **eru** tit frelst. Tað **er** fingið í rættlag. Og ikki er ráðiligt at ivast í tí, sum Gud hevur fullgjørt ella at blanda okkurt av okkara egna upp í tað. „Tí av náði eru tit frelst við trúgv, og tað er ikki tykkum at takka, tað er Guds gáva; ikki av gerningum, fyri at ongin skal rósa sær." Ein holl og vandin lýsing av rætta samanhanginum. Fyri at ongin misskiljing skal vera, verður lagt afturat, at „vit eru verk hansara, skapað í Kristi Jesusi til góðar gerningar, sum Gud frammanundan hevur skipað fyri, at vit skulu leggja okkum eina við teimum." Góðu gerningarnir eru ikki grundarlagið, sum byggjast skal á, men vitnisburður um, hvørjum vit hoyra til og tæna. Vit verða ikki frelst av góðum gerningum, men við trúgv á Guds óuppibornu náði, og tann trúgvin pliktar til eftirfylging. Móttøkan av óuppibornu náðini kallar á góðu gerningarnar. Tann, sum hevur fingið eina

botnleysa skuld fyrigivna, fer av takksemi at stremba eftir at tæna, tí náðin fer at heysta tað, sum hon sáar. Viðurkenningin av, at vit verða við undirlutan í hesi stremban, noyðir okkum aftur til byrjanina, „tí av náði eru tit frelst við trúgv." Hetta er rytman í lívinum saman við Gudi.

*Eg má hava Jesus við mær,*
*við í lívsins harða stríð,*
*við í ljósum góðum døgum,*
*við í tungu mótgangstíð.*

# Dreymafangarar

Muslimar vitna ofta um tann týdning, sum dreymar hava í lívi teirra. Keith hevur arbeitt í tí muslimska heiminum so leingi, at hann hoyrir um muslimar, ið droyma um eina „ljósskepnu", sum kemur til teirra í dreymi og fær teir at søkja eftir einum hægri sannleika. Ein av hesum muslimum var ein pakistanskur hýruvognsførari, sum æt Ahmad.

„Hvat hevur tú droymt?" spurdi Keith Ahmad. Eyguni í Ahmadi glógvaðu, tá ið hann fekk henda spurning. „Eg havi havt henda dreymin mangar ferðir," segði hann, „um ein mann, sum lýsti so blankur sum sólin. Eg sá ikki andlit hansara, men hann rætti hondina út ímóti mær í kærleika."

Keith tók eitt eintak av Nýggja Testamenti á málinum urdu upp úr tasku síni, og hann blaðaði upp á Matteus-evangeliið kap. 17. „Vilt tú lesa tvey tey fyrstu versini fyri mær?" spurdi hann Ahmad. „Eg hugsi, at tú fert at halda, at tey eru áhugaverd." Ahmad tók bókina og las tvey tey fyrstu versini:

„Og seks dagar aftaná tekur Jesus Pætur og Jákup og Jóhannes, bróður hansara, við sær og fer við teimum einsæris niðan á eitt høgt fjall. Og hann umbroyttist fyri eygum teirra, og andlit hansara skein sum sólin, og klæði hansara vórðu hvít sum ljósið." (Matt. 17,1-2).

Ahmad hugdi upp á Keith við stórum, bilsnum eygum. „Hatta er hann," segði hann, „maðurin í dreymum mínum. Hvør er hann?"

Keith hevði lært seg at vera ein „dreymafangari" fyri Jesus. Hann ásannar, at Heilagi Andin kann brúka óvanligar mátar at náa muslimar.

„Jesus lovaði, at tá ið Heilagi Andin kemur, skal hann sannføra heimin um synd og um rættvísi og um dóm,“ sigur Keith. „Muslimar eru ein partur av heiminum, og dreymar kunnu vera mátin, har Gud sannførir teir um teirra tørv á Jesusi.“

Og vit kunnu leggja afturat: „Tí at vissuliga talar Gud bæði á ein og annan hátt, men menn geva tí ongan ans. Í dreymum, í náttarsjónum, tá ið tungur svøvnur er fallin á menn, og teir liggja og dúra í rekkjum sínum...“ (Job 33,14-15).

*„30 dage i bøn for den muslimske verden“*

*Effie Campbell* umsetti.

# Hin innrista lógin

*Eg skal geva lógir mínar í huga teirra. Hebr. 8,10.*

Hvussu mangan hoyra vit ikki ungfólk kjakast, um hetta er synd ella ikki. Tað er eisini týdningarmikið hjá okkum at vita, hvat er synd, so vit kunnu sleppa undan henni. Men ein svarlisti um, hvat er synd, og hvat ikki er synd, er ikki til.

Men Gud hevur lovað okkum, at tað menniskjað, sum fegið vil gera Guds vilja, og tí strembar eftir at liva Gudi nær hvønn dag, skal fáa Guds lógir givnar í sítt hjarta – so nýtist menniskjanum ikki nakran svarlista um syndina, men veit í hjarta sínum, hvar Guds vegur gongur í øllum førum.

Tí ræður um, at vit venja okkum at gera Guds vilja og halda Guds lóg, har hon liggur greið í ljósinum. Tá verða vit vand at meta um, hvar Guds vegur gongur í øðrum fløktari førum. Tí er venjing alneyðug.

Latum okkum so í dag venja okkum at halda Guds lóg av hjarta og við bøn um, at Gud gevur okkum kraft til hetta. So fáa vit kraftina – og so verða Guds lógir givnar okkum í huga.

*t.* týddi.

---

Gud hevur ført Ísrael, sítt gamla fólk, heim fyri at tey skulu verða verandi í landinum og harvið boða frá, at tíðin, til Messias kemur aftur, nærkast. Hann gongur við kvikligum fetum nú. *e.c.* ums.

# Dýrabarari enn gull

Skip, sum liggja bundin við bryggju í eini havn, eru púra trygg. Men skipini eru ikki bara ætlað til tað. Tey skulu sigla úti í lívsins sólskini og stormum, mjørka og vindi, og tæna Gudi og menniskjum.

Mangar ymsar royndir og mótburður koma á leið okkara. Kanska gongur tú tyngdur av eini sorg, sum ongin veit um. Ella tú ert endaður inni í eini blindgøtu og finnur ongan veg út haðani.

Trupulleikunum, tú stríðist við, hevur Gud útvegir fyri. Men eftir Guds ætlan skal roynslan skapa okkurt meira: **Eina roynda trúgv.** Vit mugu venja okkum at trúgva og vísa tolmóð. Tí, sigur Pætur um trúnna....„*sum tit skulu fegnast um, tó at tit nú eina skamma stund, um so skal vera, kenna harm í mongum ymsum royndum, fyri at tykkara roynda trúgv, sum er nógv dýrmætari enn hitt forgongiliga gullið, sum tó verður roynt í eldi, má verða funnin til lovs og dýrdar og heiðurs í opinbering Jesu Krists.*“ 1. Pæt. 1,6-7.

*Legg tínar sorgir á Harran, tín Gud*
*vilstur í skyggjandi gulli ei er hann,*
*suff tíni telur hann, tár tíni ber hann,*
*so tú í dýrd hans og sælu fært lut.*

---

## Staðgongufólk

Staðgongufólk er eitt menniskja, sum gongur inn staðin fyri teg og átekur sær ta revsingina, sum tú skuldi havt. Vit møta hesum hugtaki gjøgnum alla Bíbliuna: Lambið (2. Mós. 29,38), Juda (1. Mós. 44, 16. 33), Móses (2. Mós. 32,32) og Jesus (Jóh. 19,30).

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74